# Fer at raka verkafólk og tey ungu sera hart

**– Verður tilmælið hjá einum arbeiðsbólki hjá landsstýrinum sett í verk, fer tað at raka verkafólkið og tey ungu harðast, siga Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag**

SKATTUR OG AVGJØLD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta fer at fáa sera álvarsligar avleiðingar fyri okkara ungdóm.

Dómurin hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag yvir tilmælið, sum ein arbeiðsbólkur undir Fíggjarmálaráðnum hevur handað landsstýrinum, er greiður og eirindaleysur.

Fíggjarmálaráðið setti fyri tíð síðani ein arbeiðsbólk at kanna mvg og avgjøld og at gera eitt tilmælið til landsstýrið um broytingar.

Tilmælið er nú komið og tað er síðani send ymsum feløgum til ummælis.

– Verður tilmælið frá arbeiðsbólkinum fylt, fer tað at raka tey, sum eru ringast fyri frammanundan, nevniliga tey ungu og verkafólki, siga Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag í eini felags viðmerking um málið.



*Fylgir landsstýrið ráðunum frá einum arbeiðsbólki hjá fíggjarmálaráðnum, verður tað einar 100.000 – 150.000 krónur at byggja eina vanlig sethús, siga Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag*

### Àlvarsligar avleiðingar fyri ungdómin

Eitt tilmæli, sum arbeiðsbólkurin mælir til, er at nú skal mvg eisini gjaldast av arbeiðslønum í samband við húsabygging.

– Hetta er sera lítið umhugsað, tí hetta fer at fáa sera álvarsligar avleiðingar fyri okkara ungdóm, sum skal seta búgv, og tað er óskiljandi, at arbeiðsbólkurin als ikki tykist at hava hugsað um hesar avleiðingar.

– Arbeiðslønin at byggja eini sethús er vanliga 400.000 til 600.000 krónur og skulu tey, sum byggja, nú eisini gjalda mvg av arbeiðslønini, fer tað sostatt at føra við sær, at eini hús verða 100.000 til 150.000,00 krónur dýrari at byggja.

Arbeiðsbólkurin sigur, at tey sum byggja, vinna ein part av hesum innaftur við tað, at ætlanin er eisini, at punktgjøld skulu takast av hvítvørum og útvarps- og sjónvarpstólum.

– Tað er átaluvert, at einki verður nevnt um, at útreiðslurnar til vanligar hvítvørur eru rættiliga nógv lægri enn útreiðslurnar til arbeiðsløn. Samanumtikið verður talan sostatt um eina munandi útreiðsluøking hjá teimum, sum byggja, siga tey bæði verkafeløgini.

– Hendan útreiðsluøking fer í stóran mun at raka tey, sum frammanundan eru ringast fyri fíggjarliga, tí ein tílík øking hevur ikki somu ávirkan á eitt húski, sum hevur eina inntøku upp á 700.000 - 800.000 krónur um árið, sum tað hevur á eitt húski, sum bert forvinnur 200.000 - 300.000 krónur um árið.

– Enn meira asosialt verður tilmælið, tá vit kunnu staðfesta, at familjan við hægru inntøkuni harumframt fer at fáa størri fyrimun av ætlaða skattalættanum, sigur Føroya Arbeiðarafelag

### Ein duld roynd at hækka skattin

Felagið sigur, at tað hevur somu hugsan um tilmælið um at nú skal mvg eisini leggjast heilivág.

– Aftur her verður tað tey, sum frammanundan eru ringast fyri, sum fara at merkja sviðan av hesari útreiðsluøking. Enn meira ivasom er ætlaða broytingin, tá talan eisini í nógvum førum er um fólk, sum eisini dragast við heilsutrupulleikar, sigur Føroya Arbeiðarafelag.

Annars tekur Føroya Arbeiðarafelag sum heild undir við, at umhvørvisgjald, ella grønt avgjald, verða lagt á dálkandi virksemi.

Men hetta eigur ikki at raka arbeiðsfólk, sum eru noydd at koyra í egnum bili til og frá arbeiði.

Tey bæði verkafeløgini eru sannførd um, at veruliga ætlanin við hesum arbeiðsbólkinum er ein dulda roynd at at økja um inntøkur landskassans, og sostatt eisini at herða skatta- og avgjaldstrýstinum í samfelag okkara.

– Og tað mótmæla vit staðiliga, siga Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag.

Sí annars viðmerkingarnar frá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag í fullum líki á síðu 13.

# Nógvir føroyingar fara at sita kaldir í vetur

**Føroya Arbeiðarafelag mælir samgonguni til heldur at lækka oljuavgjaldið enn at lækka skattin, tí tað høvdu tey lágløntu veruliga fingið nakað burturúr**

SKATTUR OG AVGJALD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Øll tey mongu, sum hava lágar inntøkur, fáa lítið og onki burturúr einum skattalætta. Vildi samgongan av álvara lætt um hjá teimum lágløntu, skuldi hon heldur tikið oljuavgjaldið av.

Tað heldur Ingeborg Vinther, forkvinna á Føroya Arbeiðarafelag.

Hon mælir sostatt samgonguni til at taka oljuavgjaldið av, heldur enn at seta ætlaða skattalættan í gildi.

Ingeborg Vinther sigur, at oljuavgjaldið vendir avgjørt tann tunga endan niðureftir, tí tey, sum forvinna 150.000 - 200.000 krónur um árið, hava nógv verri ráð til at betala oljuavgjald, enn tey, sum forvinna eina hálva millión.

Hon vísir eisini á, at oljan er blivin sera dýr. Hon er nú omannfyri 4,50 krónur fyri liturin. Oljuavgjaldið er heili 80 oyru fyri liturin.Varð oljuavgjaldið tikið av, hevði prísurin á olju sostatt komið niður á 3,70 krónur fyri liturin. Og tað er rættiliga stórur munur, tí sostatt høvdu fólk spart 800 krónur uppá ein vanligan oljutanga upp á 1000 litrar.

### Sita køld í vetur

Ingeorg Vinther sigur, at hetta hevði verið ein ovurhonds stórur lætti hjá einum vanligum húski, tí oljan er nú so dýr, at hon er blivin ein veruligur trupulleiki at betala.

Samstundis er arbeiðsloysið alsamt veksandi, ikki minst í fiskivinnuni á landi, har ein stórur partur av limunum í verkamannafeløgunum arbeiða.

Hon vísir eisini á, at stuðulin, sum fæst úr ALS, er altíð roknaður eftir inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar.

So hvørt, arbeiðsloysið veksur, minkar inntøkan og sostatt eisini útgjaldið úr ALS, og tað eru mong, sum fáa minni enn 50 krónur um tíman frá ALS og tað kann ongin liva fyri.

Men Ingeborg Vinther hevur eisini hoyrt dømi um fólk, sum fáa undir 20 krónur um tíman frá ALS og enntá undir 10 krónur um tíman.

– Í Føroya Arbeiðarafelag frætta vit av og á um húski við lágum lønum, sum als ikki hava ráð til at fylla sær tangan. Og tað er ongin ivi um, at nú veturin verður yvir okkum og tað er veruliga brúk fyri varma, verða tað mong, sum rætt og slætt koma at sita køld, tí tey hava ikki ráð til at keypa olju, nú hon er so dýr.

– Og hugsa vit um pensjónistarnar, fáa teir ikki stórt meiri í pensjón enn fyri ein góðan oljutanga um mánaðin.

– Tí heita vit staðiliga á samgonguna um at strika oljuavgjaldið, tí tað hevði muna nógv meiri hjá húskjum við lágum lønum enn ein smávegis skattalætti ger.

– Og nú oljuprísurin er methøgur, og veturin er yvir okkum, er akkurát stundin komin til at taka oljuavgjaldið av, sigur Ingeborg Vinther

Leggjast kann afturat, at samgongan ætlar at lata einar 60 milliónir í skattalætta næsta ár og tað er áleið tað sama, sum oljuavgjaldið er.



# Kvinnurnar í Fuglafirði vilja sleppa upp í part

**Ein nýggjur kvinnulisti stillar upp til kommunuvalið í Fuglafirði. Nýggi listin miðar eftir at fáa fleiri kvinnur valdar í býráðið**

NÝGGJUR KVINNULISTI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*4 av teimum 8 kvinnunum á kvinnulistanum. F.v.: Durita R. Djurhuus, Kristina Larsen, Ninni Paulina Fornagarð og Elisabeth Eldevig. Durita er komin á soppin og er sett at eiga fyrst í november. Kristina við 5 mánaðar gamla soninum í fanginum tryggjar sær, at uppstillingarlistin er í lagi.*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

Teir níggju menninir í Fuglafjarðar býráð kunnu vænta sær ein skarpan gang á kommunuvalinum 9. november. Í Fuglafirði hava átta kvinnur tikið seg saman á ein kvinnulista, og tær miða eftir at vinna sær fleiri umboð á kommunuvalinum.

Saman við Ann F. Obradovic hevur Kristina Larsen verið at fyrireika nýggja kvinnulistan í Fuglafirði, og hon sigur, at kvinnulistin hevur verið undir uppsigling seinastu tríggjar vikurnar.

– Vit vóru nakrar, sum byrjaðu at tosa saman fyri trimum vikum síðan. Hóast vit hava verið eitt sindur ivingarsamar, hevur undirtøkan verið ómetaliga góð, og tí tóku vit týsdagin endaliga stigið at stilla upp, sigur Kristina Larsen.

Stutt fyri klokkan 18 týskvøldið varð listin handaður kommunuskrivaranum. Fyrireikararnir av Kvinnulistanum hava ynskt at hildið listan loyniligan, tí tær vildu tryggja sær, at listin gjørdist veruleiki, áðrenn tað varð almannakunngjørt.

Tað hevur ikki verið nakar trupulleiki-heldur tvørturímóti- hjá kvinnunum í Fuglafirði at finna 25 stillarar til Kvinnulistan. Tað er vert at leggja til merkis, at meir enn helmingurin av stillarunum eru mannfólk.

### Ikki spurdar

Spurd, hví kvinnurnar í Fuglafirði ikki stilla upp á teimum listum, sum vanliga stilla upp, svarar Kristina Larsen, at við undantak av einari kvinnu, er eingin teirra eftirspurd.

– Vit eru nakrar sum leingi hava havt stóran áhuga fyri kommunalpolitikki, men tað er ikki eydnast okkum at koma upp í part á teimum listum, sum hava nógv ár á baki í Fuglafirði. Tað er millum annað orsøkin til, at vit hava tikið stig til okkara egna lista. Tó skal sigast, at vit seinasta dagin áðrenn deadline fingu tilboð um at fáa pláss á borgaralista, men tá vóru vit lidnar við fyrireikinganar. vísir Kristina Larsen á.

Á kvinnulistanum í Fuglafirði eru í alt átta kvinnur, og bert ein teirra hevur áður stilla upp til kommunuval. Kristina Larsen leggur dent á, at Kvinnulistin er ikki heftur at nøkrum ávísum politiskum flokki, men er fyrst og femst ein bólkur av kvinnum, ið ynskja ávirkan á kommunuarbeiðið í Fuglafirði.

Spurd um hon væntar, at Kvinnulistin í Fuglafirði fer at vinna sær umboðan í býráðnum, svarar Kristina Larsen, at tað væntar hon, og tær miða eftir at fáa 2 - 3 kvinnur valdar.

**FAKTA**

**Kvinnulistin í Fuglafirði:**
Durita R. Djurhuus, Virkisrráðgevi
Elisabeth Eldevig, Fiskivinnufrøðingur
Ninni Paulina Fornagarð,Krambakvinna
Judy Torleifsdóttir við Gjónna, Innkeypsleiðari
Malan Kjærbo, Skrivstovukvinna
Kristina Larsen, Fyristøðufólk
Ann F. Obradovic, Krambakvinna
Marilyn Toftegaard, Reingerðingskvinna

# Úrmælingarnir skulu fáa betri sømdir

**Føroya Musikklærarafelag vil veita okkum mest framkomnu tónleikarum betri sømdir, og tí skal verandi musikkskúlaskipan dagførast**

RÁÐSTEVNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Nakrir av fyriskiparunum av ráðstevnuni um vikuskiftið. F.v.: Claire Thomsen, Andrea Heindriksdóttir, Palli Hansen og Sunnleif Rasmussen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Um vikuskiftið skipa Føroya Musikklærarafelag og Sanglærarafelag Føroya fyri ráðstevnu, um hvussu føroyski musikkskúlin skal skipa seg í framtíðini. Sunnleif Rasmussen er formaður í Føroya Musikklærarafelag, og hann er av teirri greiðu áskoðan, at tíðin er farin frá verandi musikskúlaskipan.

– Tað eru 20 ár síðan verandi musikkskúlaskipan bleiv gjørd, og ikki so mikið sum eitt komma er broytt síðan, sigur hann

Á ráðstevnuni um vikuskiftið koma fimm umboð úr norðurlondum at halda fyrilestrar, sum í hvør sínum lagi skulu vera við til birta undir kjakið um nýggja musikkskúlaskipan í Føroyum.

### Betri sømdir

Sambært Sunnleifi Rasmussen er ein av stóru trupulleikunum við núverandi lóggávu, at okkara mest framkomnu tónleikarar ikki fáa neyðugu tónleikaundirvísingina í Føroyum, og tí velja teir at fara út um landoddarnar at nema sær tónleikakunnleika.

– Vit mugu nógv duga betur at pleyga okkara elitu, so vit ikki missa tey av landinum, sigur formaðurin í Føroya Musikklærarafelag.

Hann vísir á, at nærum á hvørjum ári flyta føroyingar í onnur lond at nema sær útbúgving innan tónleik, tí teirra tørvur ikki verið nøktaður í Føroyum.

– Vit mugu leggja nógv fyri at geva elituni betri sømdir, tí alternativi er, at vit flyta trupulleikan av landinum. Vit hava lærarar, ið hava førleikað at geva undirvísing heilt inn á gáttina til konservatoriumið, og tað mugu vit gera okkum dælt av, sigur Sunnleif Rasmussen.

*Verður minni orka so sett av til breiddina?*

– Nei vit hava ongar ætlanir um at sleppa teimum upp á fjall. Vit skulu hava fleiri ressoursur til Musikkskúlan, so vit bæði megna at røkja breiddina og eisini úrmælingarnar. Tú mást gera tær heilt greitt, at tú fært ongantíð nakrar úrmælingar uttan eina breidd, og tað ætla vit halda fast um, sigur formaðurin í Musikkskúlanum.

## Kvinnurnar brynjast til valstríðið

Komandi mánakvøld verður skipa fyri fundi fyri kvinnulig valevni í Eydnuni á Oyrarbakka. Við undirheitinum "Felags avgerð felags ábyrgd" er endamálið við fundinum at brynja kvinnuligu valevnini til valstríðið og politiska arbeiðið.

Herfyri varð skipað fyri einum kvinnuseminari, sum hevði til endamáls at økja um kvinnurnar lut í politiska arbeiðinum. Í tíðindaskrivi um fundin verður boðað frá, at somu kvinnur, ið luttóku á seminarinum, skipa fyri fundinum.

Skráin á fundinum verður hendan:

• Annita á Fríðriksmørk býður vælkomin og greiðir frá arbeiðnum, sum er í gongd við at økja um kvinnurnar lut í politisku avgerðarprosessini
• Annika Wardum Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini, sigur frá um javnstøðu og kvinnuumboðan í politikki
• Eyðgunn Samuelsen og Mia Petersen, býráðslimir, siga frá spennandi royndum, og greiða frá arbeiðnum í bý- og bygdaráðum
• Per Højgaard fer at halda fyrilestur um at tora at stíga fram og um, hvat krevst av einum kommunalpoltikkara

At enda verður bólkaarbeiði, har evnið verður:
Hvussu gerast kvinnur meira sjónligar í politiska arbeiðnum?

Fundurin verður mánakvøldið 25. oktober klokkan 19 og hann endar klokkan 22.00

-páll